VALGREINAR

Góðu suðringar

Mikkjal Sørensen
valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Tað hevur stóran týdning fyri eitt lokalt samfelag sum okra, til tess at tryggja framburð, at okur standa saman .

Sum víst hevur verið á fyrr, so er arbeiðið, í oynni nógv minka, henda gongd kann ikki halda fram, og hesum kunnu okur slettis ikki liva við.

Suðuroyggin stendur fyri umleið triðinginum av útflutninginum, og tí skulu okur hava somu møguleikar fyri okra vinnu sum onnur.

Fiskavirkini skulu hava betri umstøður so tey eru kappingarfør við onnur virkir. Her verður hugsað bæði um flutningstuðul og avskipingarmøguleikar - og skal beinleiðis flutningur skipast niður á meginlandi.

Loysn skal fáast á flakavirkinum í Vági, antin má tað almenna fiskavirking byrja framleiðslu á flakavirkinum her og nú ella skal virkið á aðrar hendur.

Alivinnan sum heild er í kreppu, hetta kemur, at merkjast týðiligari seinni í ár.

Tað er tí, at fegnast um, at alivinnan her suðuri er endurreist við føroyskum kapitali, og kemur hon sum fráliður, at geva meiri virksemi.

Standa okur saman, so kunnu okur eisini í felag útinna „ mangt eitt roysnisverkið „.

At menn hava dirvi og áræði at fara undir nýggjar ætlanir er at frøðast um og fáa mín fulla stuðul.

Tá vinnan hevur tað gott - hava okur tað gott.

Umsitingin og avgreiðslan av Smyrli verður flutt til Suðuroyar.

Eitt annað mál sum kemur, at hava stóran týdning fyri oynna er tunnilin Hov-Øravík - tað er eitt krav frá suðringum, at tunnilin verður gjøgnumførdur so niðarliga í dalinum hetta letur seg gera - peningur skal játtast á figgjarlógini í ár og fyrireikingarnar eiga, at byrja beinanvegin. Samstundis eigur støða at takast til hvar grótið úr tunlinum skal nýtast.

Álit eru skrivað um útjaðaran seinnu árini, men lítið av ítøkiligum politikki hevur veri at sæð.

Nú skulu ætlanir og orð gerast til veruleika og tí er mín áheitan á tygum um at stuðla javnaðarflokkin 20. januar.

Gott val.

Betri barsilsskipan

Karina Fagralón
valevni Sambandsfloksins í Norðstreymoy

Fráfarna samgonga ætlaði at forverra barsilsskipanina, men lukkutið bleiv val útskrivað, áðrenn barnafamiljan varð skerd enn meiri. Um Sambandsflokkurin kemur við í samgongu eftir valið, verður barsilsskipanin tvørturímóti forbetrað.

Sambandsflokkurin vil arbeiða fram ímóti, at øll foreldur fáa møguleika fyri at vera heima hjá nýfødda barninum tað fyrsta árið. Hetta skal vera við løn sum tað er í grannalondinum.

Fyrsta broytingin skal vera, at mamma/pápi sjálv gera av, um tey ynskja fulla løn í tær fyrstu 24 vikurnar ella hálva løn í 48 vikur.

Hararfturat eiga foreldrini sjálvi at avgera, hvør teirra ið skal vera í farloyvi hetta tíðarskeiðið.

Á henda hátt fær arbeiðsgevarin eitt meira motiveraða starvsfólk aftur til arbeiðis, og fráveran vegna sjúkt barn verður minni. Hetta letur samstundis upp fyri, at ein møguligur avloysari fær starv eitt longri tíðarskeið.

Hugsjónin

Gunnar K Nattestad
valevni Sambandsfloksins í Vágum

Partur av hugsjón Sambandsflokksins er ríkis-felagskapurin. Hesin felagskapur er til eina og hvørja tíð, ein mynd av viljanum til samstarv. Um viljin er til staðar, er ríkisfelagsskapurin ein góður grundvøllur fyri framhaldandi trivnaði og menning av okkara fólki og landi.

"Innanfyri felagskapin hevur eingin tjóð fullveldið, men allar tjóðirnar hava størri rásarúm og fleiri møguleikar enn um tær vóru einsamallar."

Hetta er kjarnin í sambandshugsjónini.

Ríkisfelagskapurin er ikki átrúnaður. Tíðirnar broytast og eingin veit hvat hendir um 100 ár, men sum støðan er nú, standa smáu tjóðirnar seg best í felagsskapi.

Tað er ikki bara dansur á rósum at samstarva; heldur ikki hjá okkum. Hyggja vit at hvussu nógv okkara samfelag er ment seinastu gott hundrað árini, so er skilligt, at fyrimunirnir hava verið nógv størri enn vansarnir. Vit eru uppá gott hundrað ár, ment frá bóndasamfelagi til vælferðarsamfelag millum heimsins fremstu. Flestu onnur lond hava brúkt tvey til tríhundrað ár uppá somu menning.

Samstarv krevur dirvi - ikki minst frá okkara síðu. Vit eru tann minsti parturin í felagskapinum, bæði í tali og vídd, men vit hava nógv at bjóða. Hettar hava vit og fara vit at prógva.

Vit fáa framvegis eina peningaliga veiting frá Danmark og hettar hevur verið okkum til stórt gagn. Í løtuni er neyvan ráðiligt at at skera meira av blokkinum, men vit eiga alla tíðina at hava kósina móti einum sjálvberandi búskap. Liberala hugsjónini gevur tí einstaka frælsi og ábyrgd. Hettar merkir m.a. at einstaklingurin, um gjørligt, skal klára seg sjálvan búskaparliga.

Ríkisfelagskapurin er ikki ein koddi at sova á og tí skula vit í longdini gjalda okkara egna húsarhald; men tað merkir ikki at vit kvetta felagskapin. Tvørtur í móti!

Vit skula byggja og laga okkara felagskap til tey krøv og broytingar, ið koma. Hettar, saman við liberalu og sosialu hugsjónini, er eitt sera gott grundarlag fyri nútíð eins væl og framtíð.

Afturvendandi jólaheilsanin, sum bráddliga steðgaði

Jenis av Rana
valevni fyri Miðflokkin í Suðurstreymi

Á hvørjum heysti, trúliga afturvendandi, kom hon, jólaheilsanin til starvsfólk innan føroyska heilsuverkið, ein fjølmiðlaborin hóttan um uppsøgn vegna manglandi játtan.

Júst tá jólahugnin og stákanin byrjaðu, breiddi óttin fyri uppsøgn seg serliga á sjúkrahúsum okkara- í Klaksvík, í Suðri og á Landssjúkrahúsinum.

Hevur tú lagt merki til, at hon steðgaði fyri tveimum árum síðani?

Hví?

Miðflokkurin hevur umsitið málið hesi bæði árini og raðfest so, at vanligi borgarin, hann, sum hvønn mánaða sendir ein part av løn sínari í landskassan, kann kenna seg tryggur.

Hjálp okkum at tryggja Føroyar og føroyingar á øllum økjum, vel Miðflokkin týsdagin.

Vinnupolitikkur ella atgerðarloysi?

Katrin Dahl Jakobsen
løgtingskvinna og valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Fyri bert einum ári síðani var dagliga at hoyra í miðlunum um virkir og fyritøkur, serliga fiskavirkir, sum manglaðu fólk til arbeiðis. Fólk komu í hópatali uttan úr heimi at virka her hjá okkum.

Tíverri er støðan nú so púrasta vend: Nú hoyra vit dagliga um uppsagnir, at virkir lata aftur, og at skip flagga út ella verða seld av landinum, tí ikki er figgjarligt ráðiligt at hava tey.

Onkur spyr kanska, hví ein politikari skal bríggja seg um hettar? Tað hevur nú verið gott latín her á landi í nógv ár, at politikarar skulu venja seg við at "seta karmarnar" og so lata vinnuna sjálva legna seg.

Og hesa "lektiu" hevur sitandi samgonga lært seg vel og viðiliga uttan-at. So væl og dúgliga lesa teir lærubøkur sínar, at teir valla kvaklast við, meðan tað, teir lesa um, er við at sindrast.

Tað er tíverri ein sannroynd, at bæði rækjuvinnan og alivinnan standa fyri at fara á húsagang. Hesar báðar vinnur umboða í dag umleið 25% av okkara útflutningi.

Haldi ikki, at nøkur stjórn í heiminum hevði torað at sitið hendur í favn og hugt at, meðan ein fjórðingur av útflutningsvinnu landsins fór á húsagang. Sjálvt ikki tær mest neoliberalistisku stjórnirnar høvdu latið staðið til.

Tær høvdu í minsta lagi viðgjørt spurningin. Fyrst og fremst politiskt, síðani við vinnuna sjálva og sjálvandi eisini við figgjarheimin.

Tað einasta vit higartil havi sæð hesum viðvíkjandi, er ein blind turkatrúgv upp á, at tað nokk fer at laga seg, bara vit lata dyrnar upp fyri útlendskum kapitali!!

Ivasamt er, um íleggjarar tíma at koma hendan vegin at seta pening í vinnur, sum eru í so djúpari kreppu: rækjuvinnan fær ikki nóg mikið fyri vørurnar, og alivinnan hevur bæði sjúku og alt ov lágar prísir at berjast við.

Tað er eingin, sum ivast í, at báðar hesar vinnugreinir eru við at bløða út. Um ikki okkurt heilt óvæntað hendir innan heilt stutta tíð, fara stórir partar av alivinnuni og rækjuvinnuni á húsagang.

Um talan var um einkult fyritøkur, var einfalda og rættasta loysnin at koyrt hesar gjøgnum tvingsilsølur, og so keypti onkur annar fyritøkuna aftur og byrjaði av nýggjum.

Men nú er talan um heilar vinnupartar.Tora vit at lata eina heila vinnu fara á húsagang? Standa keyparar til eina heila vinnugrein klárir at yvirtaka? Helst ikki.Tí mugu politikarar spyrja seg sjálvar: Hvat kunnu vit gera við henda álvarsliga samfelagstrupulleikan.

Flestu munnu vera sera varin við, at tað almenna skal blanda seg uppí. Og tað av røttum. Men hetta er eitt álvarsmál, og vit sleppa ikki undan at viðgera spurningin.

Líka so ábyrgdarleyst tað er at veita vinnuni rakstrarstuðul, lika so ábyrgdarleyst er einki at gera!

VALGREINAR

Politikkur er at gera skipanir fyri framtíðina

Andrias Petersen
løgtingsmaður, valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy

Eitt komandi løgting stendur framma fyri stórum avbjóðingum, ikki bert tí at búskapurin er hóttur, men eisini tí at okkara samfelag hevur brúk fyri skipanum, sum skulu røkka nógv ár fram.

Undan seinasta vali vóru allir flokkar samdir um, at ein nýggj pensiónsskipan skuldi smíðast. Valið var sum kunnugt í 2002 og ikki fyrrenn 5. september 2003 varð nevnd sett at arbeiða við hesi skipan. Hetta sýnir tann áhuga verandi samgonga hevur fyri hesum stóra og týdningarmikla máli hjá teimum, sum í dag eru í besta arbeiðsføra aldri. Undirritaði hevur spurt fer eftir fer frá tingsins røðarapalli nær og hví hetta arbeiðið ikki fór í gongd.

Javnaðarflokkurin hevur tað fatan, at tað er av allarstørsta týdningi, at vit fáa skapt eina nýggja pensiónsskipan, sum hvílur á trimum beinum:

- Núverandi fólkapensión
- Samhaldsfasta arbeiðsmarknaðarpensiónina
- Fakfelagspensiónina

Hetta gevur eina vissa trygd við tað, at man spjaðir veitingina yvir tríggjar keldur og samstundis minkar trýstið á landskassan. Eisini er ein fyrimunur, at alt hetta førir til eina pengauppsamlan í grunnar, har ein partur kann nnýtast til tryggar íløgur innan- og uttanlands.

Tað er ongantíð ov skjótt at fara í gongd við eina sovorna skipanm, tí tað tekur umleið 25 ár at fáa eina sovorna skipan at virka til fulnar. Øll hini Norðurlondini gjørdu tílíka skipanir í 1960-árinum og virka tær væl í dag. Málið er, at ein pensión skal verða umleið 70% av seinastu ársinntøku, tá ein var á arbeiðsmarknaðinum.

Javnaðarflokkurin og undirritaði vilja leggja nógva orku í at fáa eina tílíka skipan politiskt viðtikna við stórst møguligari semjui. Eingin ivi er um, at skal ein skipan av slíkum slag halda, so krevst breið politisk semja.

Eg stríðist fyri hesum!

Torleif Sigurðsson
valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum

Fyri hesum stríðist eg og fari framvegis at stríðast fyri:

- Bestu byrjunarárum fyri allar Norðoyingar
- Trivnaði fyri øllum í Norðoyggjum
- Arbeiða fyri altjóða góðkendari skipahavn í Klaksvík.
- Arbeiðsplássum á sjógvi og landi í Norðoyggjum
- Bestu ellisárum fyri allar Norðoyingar.

Mat til børnini í fólkaskúlanum

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins
www.lindenskov.com

Ein stórur trupulleiki í fólkaskúlanum er, at børnini ikki fáa nóg góðan mat. Í Svoríki hava børnini síðani 1940'ini fingið heitan mat í døgverðatímanum. Tað tók langa tíð til at tey í Danmark skiltu, at hetta er vegurin fram. Men nú eru tað fleiri og fleiri skúlar sum bjóða børnunum mat. Um leið triði hvør fólkaskúli í Danmark bjóðar nú børnunum mat.

Vit í Føroyum hava lítið gjørt við hesi viðurskifti, hoast onkur glotti er. Adventistaskúlin byrjaði við skúlabyrjan 2003 at geva børnum sínum sunnan mat. í Hoyvíkar skúla er ein lítlil roynd við at geva børnunum frukt og skúlabreyð. Børnini skuldu tekna seg til skipanina og gjalda eina lítla upphædd. Minst 50 børn skuldu tekna seg til skipanina fyri at hon kundi gerast veruleiki, men tá avtornaði høvdu fimm ferðir so nógv teknað seg. Børnini vóru sera glað fyri skipanina, hóast onkur gjarna hevði viljað havt ost á skúlabreyðið. Hugsið tykkum so til, um vit høvdu bjóða børnunum góðan heitan mat!

Tað er ein sannroynd, at tað er sera ymiskt, hvussu matpakkin sær út hjá børnunum. Summi hava ein flatan livursteimatpakka við, onnur fáa ein luksur matpakka við frá foreldrum, sum veruliga hava yvirskot til at taka sær væl av børnunum. Aftur onnur hava slett einki við og renna yvir í onkra kiosk at keypa sær eitt Twix ella okkurt líknandi.

Svenskar kanningar vísa sambært Politikken, at næmingarnir, sum eta døgverða klára seg væl betri enn teir, sum ikki eta nakað ella bara eta okkurt ósunt.

Hetta er so týdningarmikið mál, at bæði land, kommunur og skúlar saman við foreldrum eiga at taka málið upp til viðgerðar. Á mínari heimasíðu havi eg nakrar slóðir til Greinar um hetta evni.

Vilt tú vita meira, um hvat eg tikist við seinastu 4 árini, so vitja mína heimasíðu www.lindenskov.com. Har liggja hundrað tals greinar, røður o.a. frá hesum tíðarskeiði.

Betri leigulóg og systkinaavsláttur til familjuna

Sophus E. Dal Christiansen
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Tað góða samfelagið er borganin fyri einum ábyrgdarfullum familju- og ungdómspolitikki. Best møguligt kor skulu verða hjá ungum føroyingum at seta búgv, stovna familju og eiga børn.

Javnaðarflokkurin fer at arbeiða fyri, at foreldur við tveimum ella fleiri børnum í ansing fáa systkinaavsláttur, so tað gerst bíligari at hava børnini á ansingarstovni. Javnaðarflokkurin virkar fyri at fáa eina vælvirkandi barsilsskipan, sum passar til tað føroyska samfelagið.

Eisini fer Javnaðarflokkurin at arbeiða fyri, at íbúðarmarknaðurin gerst meira fjøltáttaður, so at lóggávan verður broytt til, at íbúðarfelóg fáa somu rentustuðuls- og mvg-sømdir sum tey, ið byggja privat sethús. Nýggj leigulóg skal bøta um korini hjá leigarum, sum í dag nærum standa rættarleysir, um trupulleikar stinga seg upp millum leigara og eigara.

Rentustuðulin skal haldast á verandi støði.

Okkara børnum skal at fáa dagført undirvísingartilfarið, so frálæran stendur mát við nútíðina.

Bøtast skal munandi um korini hjá ungdómum okkara, sum ganga á miðnámskúlum. Eitt nú er studentaskúlin í Hoydølum niðurslitin, og næmingarnir hava trongar umstøður at virka undir. Komandi samgonga eigur at raðfesta eina umvæling og nútímansgerð av Studentaskúlanum frammarlaga.

Strembast skal fram ímóti at bjóða fleiri altjóða hægri útbúgvingar í Føroyum, men tó skal ungdómur okkara framvegist stuðlast og mennast til at útbúgva seg í útlondum, so vit fylgja við í altjóða menningini og alheimsgerðini.

Javnaðarflokkurin fer enn sum áður at arbeiða fyri at menna frítíðartilboðini innan ítrótt,

Tað ber væl til !

Helena Dam á Neystabø
Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi

Viljin til at lyfta í felag, at geva ungum ábyrgd og teimum eldru og førleikaskerdu betri sømdir er sálin og ryggurin í væl-ferðarsamfelagnum. Er henda sálin í lagi, so hava vit eisini ráð til at menna vælferðarsamfelagið.

Hetta kemur ikki av sær sjálvum. Men tað ber væl til, um vit raðfesta rætt.

Pensjónirnar

hækka fólkapensjónina so mikið, at tann, sum bara hevur fólkapensjónina at líta á, kundi koma upp um hungursmarkið. Talan var um nakrar og tjúgu millionir - ikki nógv samanborið við omanfyrinevndu har eg slepti. So má bera ella bresta. Heldur frákoyrd, enn svikin lyfti.

Heilsuverkið

Eisini heilsuverkið eigur framhaldandi at vera raðfest høgt. Tað væl kvalificeraða fólkið støðast ikki her, tí umstøðurnar eru ikki nóg góðar. Tí má ein miðvísur politikkur fremjast, ið fær vent hesari gongd. Nýta vit møguleikarnar at gera heilsuverkið til eitt gróðrarríkt granskingarøki, so vendist gongdin frá taparakós til vinnarakós. Tí er tað líka so átroðkandi at gera íløgur í heilsuverkið sum í gott arbeiði til tess at menna vælferðarsamfelagið og okkara mentan. Tað er sjálvsagt, at eisini stovnarnir mugu lagast til búskapin og menningina. Men skal skilagóð mennig fara fram, krevst arbeiðsfriður. Nógvar útmeldingar hava verið, sum hava ørkymlað starvsfólk innan tað almenna, og sum oftast hendir einki kortini.

Serliga skúlarnir treingja til arbeiðsfrið. Arbeiðsfrið og betri umstøður at liva upp til neyðugu broytingarnar. Tí stabilitetur og tryggleiki gevur styrki og